# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*»Vit fara at svara á ein hóskandi og neyðugan hátt«*
*ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert*

# Ísrael ætlar at avbyrgja Libanon frá umheiminum



*Flogvøllurin í Beirut mátti latast aftur í morgun, eftir at ísraelsk flogfør høvdu skotið rakettir eftir vøllinum.*

**Ísraelsk flogfør skutu í morgun rakettir eftir flogvøllinum í Beirut.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

-Eg havi givið teimum vápnaðu deildunum heimild til at søkja at øllum viðkomandi málum í Libanon, segði ísraelski verjumálaráðharrin, Amir Peretz, í gjár, og løtu seinni bumbaðu tey fyrstu ísraelsku flogførini støðir hjá Hizbollah-partisanum, sum halda til við við markið millum londini.

Í morgun bleiv ísraelska álopið víðkað. Ísraelsk herskip vóru at síggja í libanskum sjógvi, og ísraelsk flogfør skutu tríggjar rakettir eftir flogvøllinum í libanska høvuðsstaðnum Beirut. Ferðamannaflogfør, sum vóru á veg til Beirut, fingu boð um at broyta kós og noyddust at lenda aðrastaðni í Miðeystri. Stutt eftir kunngjørdu libansku fjølmiðlarnir, at flogvøllurin í høvuðsstaðnum var stongdur.

Útvarpið hjá ísraelska herinum segði fyrrapartin, at ætlanin er at avbyrgja Libanon frá umheiminum bæði í luftini, á sjónum og á jørðini sum hevnd fyri, at tveir ísraelskir hermenn eru burturfluttir í Suðurlibanon, sum er undir Hizbollah-eftirliti.

Libanska løgreglan segði í morgun, at minst 27 sivilfólk hava latið lív í ísraelsku álopunum. Tíggju teirra vóru úr sama húsi, og teirra millum vóru fleiri børn, sigur løgreglan. Sambært libansku myndugleikunum eru ísraelsku álopini tey harðastu síðani innrásina í 1982.

Ísraelsku flogførini fóru á flog, beint eftir at Hizbollah hevði skotið rakettir eftir ísraelska býnum Kiry Shmona. Sambært útvarpinum hjá herinum raktu fleiri rakettir eisini býin Nahariya, har eitt fólk doyði, og trý vórðu særd.

### Eisini í Gaza

Samstundis hevur Ísrael hert álopini í Gaza-geiranum. Í nátt bumbaðu flogfør skrivstovurnar hjá uttanríkisráðnum, og í morgun stóð bygningurin í ljósum loga, skrivar Reuters. Fleiri hús nærhendis uttanríkisráðnum vóru eisini løgd í oyði av bumbunum. Ísraelski herurin sigur, at palestinska uttanríkisráðið bleiv bumbað, tí Hamas brúkti bygningin til at leggja ætlanir um álop á ísraelsk mál.

Nú eru skjótt tríggjar vikur, síðani tann vápnaði vongurin av Hamas burturflutti ein 19 ára gamlan ísraelskan hermann. Hamas krevur at fáa fangar í býti við hermannin. Tað sama krevur Hizbollah at fáa fyri teir báðar hermenninar, sum felagsskapurin hevur burturflutt, men Ísrael hevur svarað báðum pørtum, at tað kemur ikki upp á tal at slaka fyri yvirgangsmonnum.

-Vit fara tvørturímóti at svara á ein hátt, sum vit halda vera hóskandi og neyðugan, hevur Ehud Olmert, forsætisráðharri, sagt.

# Samráðingarslit

**Norðurkorea er hvørki til at høgga ella stinga í.**

RAKETTSTRÍÐ
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Kina og Suðurkorea noyddust í nátt at ásanna, at tað var nyttuleyst at halda fram við samráðingunum við Norðurkorea um rakettroyndirnar hjá landinum. Sum skilst høvdu Kina og Suðurkorea kravt, at norðurkoreanar skulu gevast við at royna langtberandi rakettir, men tað vildiu tey norðurkoreonsku umboðini ikki góðtaka.

Kina verður vanliga roknað sum tann fremsti sameindi hjá Norðurkorea, og tí kom samráðingarslitið í nátt rættiliga óvart á útlendskar diplomatar, skrivar Reuters.

USA og Japan krevja, at altjóða samfelagið skal seta tiltøk í verk ímóti Norðurkorea, men tað vilja Russland og Kina ikki.

Suðurkoreanska stjórnin segði í gjár, at tekur Norðurkorea rakettroyndirnar uppaftur, fer tað at fáa álvarssamar avleiðingar fyri viðurskiftini millum tey bæði londini.

-Vit góðtaka heilt einfalt ikki fleiri royndir, segði talsmaðurin hjá stjórnini.

## Blair vil hava 13 heldur enn 8

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, heldur, at Kina, India, Brasil, Meksiko og Suðurafrika eiga at sleppa upp í G8-felagsskapin hjá teimum stóru ídnaðarlondunum.

Við blaðið The Guardian sigur Blair, at tað hevði styrkt samstarvið um fleiri týðandi mál so sum altjóða handil, veðurlagsbroytingar og Iran. Hann sigur, at tað er serliga umráðandi at fáa ein nýggjan sáttmála um veðurlagið, men at ein slíkur hevur lítlan og ongan týdning, eydnast tað ikki at fáa USA, Kina og India at taka undir við honum.

Um vikuskiftið halda G8-londini fund í Russlandi, og har fer Blair at skjóta upp, at Kina, India, Brasil, Meksiko og Suðurafrika sleppa uppí, so felagsskapurin í framtíðini skal eita G13. Londini, sum nú mynda G8-bólkin, eru USA, Russland, Bretland, Frakland, Týskland, Italia, Kanada og Japan.



*Blair vil hava G13 heldur enn G8.*

## Gongur væl í Vatikaninum

Tað gongur væl hjá Vatikaninum, í hvussu er fíggjarliga. Ársroknskapurin fyri árið í fjør vísir 70 milliónir krónur í avlopi, og úrslitið er tað besta í átta ár, skrivar AP úr Rom

Dergio Sebastiani, kardinalur, sum umsitur tey fíggjarligu viðurskiftini hjá Vatikaninum, sigur, at leiðslan í Vatikaninum er stak væl nøgd við úrslitið í 2005. Í fleiri ár hevði Vatikanið hall, men í 2004 eydnaðist at venda hallinum til 20 milliónir krónur í avlopi við umfatandi sparingum. Tann politikkurin helt fram í fjør, og tað sæst eisini á úrslitinum, segði Sebastiani, tá hann almannakunngjørdi ársroknskapin.

Umleið 850 fólk hava fastan bústað í Vatikaninum í Rom.

## Statoil størst í Norðurlondum

Tólv norðurlendskar fyritøkur hava fingið pláss á einum yvirliti, sum umfatar 500 tær størstu fyritøkurnar í heiminum, seks svenskar, tvær danskar, tvær norskar og tvær finskar.

Tann størsta fyritøkan í Norðurlondum er norska oljufelagið Statoil, sum er nummar 70 á yvirlitinum. Tann næststørsta er svenska Volvo, sum er nummar 178, og triðstørst er Norsk Hydro, sum er nummar 222. Hinar svensku fyritøkurnar í yvirlitinum eru L.M. Ericsson, Electrolux, Vattenfall, Skanska og Nordea Bank. Í Danmark eru tað A.P. Møller og Danske Bank, og tær báðar finsku eru Nokia og Stora Enso.

Yvirlitið vísir annars, at oljufeløgini og bilverksmiðjurnar eru størstu fyritøkurnar í heiminum. Eitt nú er oljufelagið Exxon heimsins størsta fyritøka, og bilverksmiðjurnar General Motors, Daimler-Chrysler, Toyota og Ford Motor Company eru ávikavist nummar fimm, sjey, átta og níggju.

Heimsins størsti arbeiðsgevari er amerikanska handilsketan Wall-Mart Stores, sum hevur 1.800.000 fólk á sínum lønarlista hvønn mánað.